# Hugvekjandi sunnumorgun á Skansanum



Vitarnir eru hugtakandi, og okkurt romantiskt er við ljósinum, teir senda út í myrkrið.

Mynd: Vilmund Jacobsen

**Tankarnir leitaðu aftur til søgur um ófriðartíðir, kríggj og svik móti ungari gentu, sum fór til Havnar at halda ólavsøku**

SUNNUMORGUN
*Vilmund Jacobsen*

Sjáldan eri eg ov tíðliga, ofta heldur seinur, men sjáldan ov seinur, tá ið bussur ella bátur skulu náast. Eitt undantak var tó ein sunnumorgun herfyri; tá var eg ein heilan tíma (!) ov tíðliga niðri á Farstøðini í Havn.

Komin inn á gólvið, lá ein maður á bonkinum og svav; ein annar sat við eitt borð og droymdi um náttina, sum verið hevði. Báðir mundu teir bíða eftir bussinum. Kvinnan aftanfyri diskin var fryntlig. Eg spurdi, um fólk ofta svóvu á Farstøðini. Jú, tað kom meira enn so fyri, men oftast sótu teir úti í gongini. "Har er so kalt, so eg plagi at biðja teir koma inn um at seta seg at bíða..." segði hon.

## Út á markina

Veðrið var gott og hálvaljóst. Orkaði ikki at sita á Farstøðini ein heilan tíma. Gekk mær ein túr. Hevði myndatólið við mær. Kanska var okkurt at síggja. Leiðin bar niðan á Skansan. Eitt sindur kalt, tó ikki so, at tað bagdi. Friðarligt. Dunið frá nøkrum russarum í Nólsoyarfirði var næstan tað einasta, eg hoyrdi. Hendinga bilur sjaggaði eisini fram við. Sólin var risin úr havsbrúnni og kagaði upp um Nólsoynna. Royndi at stríða seg fram ígjøgnum skýggini.

Ein vakur februarmorgun.



*Ein friðarligur sunnumorgun á Skansanum. Í kvirruni hoyrist dunið frá russisku trolarunum í Nólsoyarfirði.*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Tók nakrar myndir út yvir fjørðin, av bygningunum á nýggja havnalagnum, russarunum í fjørðinum, kanónunum og vitanum.

Hvør veit? Kanska góðar myndir at hava í skjáttuni...

Sum eg spáki, kemur ein maður gangandi, ein frakkamaður. Veit ikki, hví vit koma í prát. Jú, hann er norðmaður. Er í Føroyum og fyrireikar ráðstevnu fyri alment lønt í norðurlondum.

## Fit for fight

Tímin, sum var til avlops, gongur skjótt, og klokkan nærkast, til bussurin koyrir.

Ár eru ímillum túrarnar niðan á Skansan, so hetta hevur verið ein øðrvísi morgun enn vanligt.

Ein hugtakandi og hugvekjandi morgun.

Spáki mær ein rundtúr aftrat. Fyrst oman til kanónirnar. Hyggi omanyvir fjøruna, havi hug at hyggja í hyljarnar, um lív er í onkrum teirra. Kanska okkurt kombikk. Tíðin røkkur ikki til. Spáki niðan um aftur vitan. Hesir eru altíð hugtakandi, tí tú hevur so mangan sæð teir senda sínar ljósstrálur um kvøldarnar. Teir kunnu saktans vera partur av einum forelskilsi ella kærleikstrega. Vitarnir hava sína uppgávu. Teir eru ábyrgdarfullir og føra teg trygt í havn. Okkurt romantiskt er við ljósinum, teir senda út í myrkrið.

Leggið til merkis talvuna, sum greiðir frá um skansarnar í Havn. Hugsi um sjórænarar, kríggj og um svikið, sum kommandanturin á Skansanum framdi ímóti ungu gentuni, Rannvu, sum kom til Havnar at halda ólavsøku.

Ein syrgilig og hjartanemandi søga.

Á veg oman aftur á Farstøðina gangi eg framvið pylsuvogninum. Í rútinum er stór reklama: Fit for fight!

Nú er best at koma inn í hitan í bussinum at seta seg... fit for fight ella ikki.

## Skansarnir

Áðrenn eg sleppi Skansatúrinum hendan sunnumorgunin, fari eg at tríva í ein part av tí søgu, sum er um skansarnar í Havn og ymiskt annað í hesum sambandi.

Í seinnu helvt av 1500-árunum hoyra vit um, at sjórænarar eru farnir at gera alsamt meira um seg í Føroyum. Hetta fekk menn at seta í verk tiltøk fyri at verja Havnina, sum tá ikki var stórt meira enn Tinganes og økið fram við Eystaruvág. Uttast á Tinganesi helt landsins fyrisiting til, og her var eisini handil og vørugoymsla.

Fyrstu verjutiltøkini, vit vita um í Havn, eru yviri á Ryggi í 16. øld. Og hvør veit; kanska var tað her, at Magnus Heinason bygdi ein skansa.

Eftir tiltikna turkaránið í Hvalba í 1629, kom gongd á skansaarbeiði, og skansin á Stangarnesi verður bygdur. Fyri at verja Tinganes móti álopum frá landi, verður Reynaskansin í 1645 bygdur tvørtur um nesið, millum býin og handilin. Næstu 20 árini fer nógv skansaarbeiði fram. Í hesum tíðarskeiði verður Lítli Skansi bygdur uttast á Tinganesi og helst eisini múraða vaktarstovan, Portugálið.

Tá ið Danmark var í bardaga við onnur lond, vóru eisini ófriðartíðir í Føroyum. Skansarnir vórðu rændir og lagdir í oyði, eitt nú í 1677 av fransmonnum og í 1808 av bretum.

Í 1749 verður Lítli Skansi niðurtikin, eins og Reynaskansin longu tá var niðurtikin. Nú var bert Stóri Skansi eftir.

## Stóri Skansi

Í 1782 gjørdist kaptein Born kommandantur í Føroyum. Tað var í hansara tíð og seinni, at skansin fekk tað skap, hann hevur í dag, ein sonevndur stjørnuskansi. Hildið verður tó, at vaktarstovan stavar frá 1600-árunum. Um hetta mundið, var eisini eitt battarí niðri á bakkanum.

Á skansanum vóru 35-40 soldátar í 1600-1700-árunum. Skansaarbeiði, ið var skylda hjá havnarborgarum, var ein tung byrða. Fyri at bøta um hetta, vórðu Skansatræðirnar norðanfyri Skansan innlagdar í 1796, so soldátarnir kundu velta sær epli, røtur og annað.

Tær fýra sonevndu málmkanónirnar frá endanum av 1700 og byrjanini av 1800-árunum, eru millum elstu minni frá skansatíðini. Hesar góvu Christiani IX skotkvøðu, tá ið hann sum fyrsti kongur steig fótin á land í Føroyum í 1874.

Í 1865 varð skansin avtikin sum hernaðarligur stovnur og somuleiðis kommandantstarvið. Jekarakorpsið, sum síðan 1830 hevði mannað skansan, varð nú í staðin til eitt politistalið, ið eitt nú hevði eftirlit við fongslinum á Skansanum.

Norðan fyri Skansan standa sersjanthúsini, har hægsti kvartermeistarin fyri politistaliðnum búði seinnu árini.

Skansin hevur alt tað, vit vita um, havt serligan týdning fyri innsiglingina til Havnina. Ein reyð lanterna varð uppsett í 1884, og í 1909 varð vitin settur á Skansan. Í 1907 varð mastur við veðurávaring reist á økinum.

So seint, sum undir seinna heimsbardaga, varð Skansin nýttur. Í 1940 tók bretska hersetingarvaldið sær Skansan til hernaðarmiðstøð. Einastu minni um hesa tíð, eru tær báðar 5,5" stóru kanónirnar, ið stava frá bretska flogberanum, Furious.

...

Hetta var so skansa-túrurin og skansasøgan hendan sunnumorgunin í februar - og kanska var túrurin ikki heilt til onga nyttu.



*Á veg heim úr Havn við gomlu Ternu eina seinastu ferð. Sólin hongur yvir Stongini og sendir sínar ljósglæmur móti skipinum.*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Ein vakur seinasti morgun

HUGLEIÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*

"Møguleikarnir, sum tað almenna ongantíð sá...".

Hetta var heitið á eini grein í Sosialinum herfyri um sjóvegis farleiðina millum Skálafjørðin og Havnina. Siglingin, sum so ofta hevur verið í andglettinum seinastu árini, er nú ikki til meira, og hesaferð bendir einki á, at hon reisir seg afturí tí líki, hon hevur verið rikin. Gongst sum ætlað, kunnu vit vænta, at ein nýggj farleið á privatum grundarlagi fer av bakkastokki um einar tveir mánaðir. Ætlandi verður siglt millum Skálafjørðin og Sund við ferju, sum verður keypt úr Noregi. Hugskotið er gott, men torført kann vera at byggja uppaftur tað, sum við árunum er máað burtur. Og tó; her er eitt grundarlag, sum røttu fólkini við hugflogi umborð á rætta skipinum eiga at kunna byggja á.

Í sínari tíð, sum ikki vóru øðrvísi enn tær, vit hava í dag, sigldi Dúgvan mangan fullsett millum Skálafjørðin og Havnina. Var skipið á beding, hendi tað seg, at tey størru skipini hjá Strandferðsluni, Smyril ella Teistin, vórðu sett at sigla onkran túrin. Tey, sum hava fylgt við á økinum, siga, at tað enntá kom fyri, at hesi stóru skip eisini sigldu fullsett.

Seinastu árini hevur gamla Terna røkt hesa farleið. Skipið hevur bara siglt við ferðafólki, ikki við bilum. Grundarlagið hevur verið ov veikt, og farleiðin hevur givið undirskot. Krøvini, sum ferðafólk seta, eru vorðin størri. Skipið er gamalt, ótíðarhóskandi og ikki serliga væl egnað, tá ið landnyrðingurin ella lágættirnar gera um seg suðuri í fjørðinum. At skipið ikki hevur tikið bilar, hevur sjálvsagt minkað um grundalagið undir farleiðini. Hinvegin er gamla Terna ikki serliga væl egnað til bilaflutnig, tí trongt er hjá bilførarum, sum standa har frammi í skipinum, at bakka bilin í land aftur. Tað er líkasum, at bilurin fæst ikki leysur frá skipssíðuni.

Manningin umborð á gomlu Ternu hevur altíð verið fryntlig og fyrikomandi. Saman við ov fáu, men trúføstu ferðafólkunum, hava manning og ferðafólk virkað sum ein "familja" á túrunum millum Skálafjørðin og Havnina.

Henda sigling, sum hevur sínar røtur heilt aftur til Thorshavn Mælkeforsyning-og Margarinfabrik, er nú farin í søguna.

Men, sum Sámal Petur í Grund segði, tá ið hann fall við seinasta løgtingsval: "Tá ið ein hurð fer aftur, lata aðrar hurðar seg upp..."

Alt bendir á, at tað verða Sámal Petur og aðrir góðir menn, sum fara at leggja lunnar undir eina nýggja rutu millum Skálafjørðin – og Sund.

Myndin av sólini, sum hongur yvir Stongini í Nólsoy, er tikin á seinastu ferðini hjá mær heim úr Havn við gomlu Ternu.

Ein vakur seinasti morgun...

Nú bíða vit í spenningi eftir tí morgni, tá ið nýggja farleiðin byrjar.